DAGSINS MEINING

Var úrslitið tað vert?

Nú verður eingin fólkaatkvøða, tjóðveldið hevur ikki bara bakkað eina, men tvær fólkaatkvøður. Sera marghátligt aftaná dundurtalur á Vaglinum, har kravt varð, at tann fyrra fólkaatkvøðan var hildin, meðan gingið var útfrá, at tann seinna eisini var á skránni. Sagt verður av samgonguni, at fullveldistøkan ikki skal fremjast uttan eina fólkaatkvøðu. Ein kundi spurt heldur speiskliga, um nakað nýtt er í hesum, og um nakar nakrantíð hevði væntað nakað annað.

Stórsta framstig í føroyskari sjálvstýrisrørslu kallar varaløgmaður við vanligum lítillætni ein lítlan setning í samgonguppskotinum, ið við ullintum vendingum minnir um proklamatiónina um at Føroyar eru ein tjóð. Aftaná at hava bakkað so nógv, sum tjóðveldið hevur aftaná at hava spilt trý ár og milliónaupphæddir fyri at koma aftur til at yvirtaka undir heimastýrislógini, so er kanska skilligt, at man við ógvusligum vendingum roynir at fáa ein lítlan setning at síggja út sum ein stórsigur.

Hendan samgongan ætlar nú at lækka blokkstuðulin niður yvir nakkan á næstu samgongu og at tíðarfesta allar tær yvirtøkur, ið teir ikki megnaðu at fremja í hesum valskeiði, ið helst má vera eitt tað soltnasta viðvíkjandi yvirtøkum, síðani heimastýrislógin kom í gildi.

Um tað var nakað veiggj í hesari samgonguni, so fór hon til val uppá at lækka blokkin við 300 — 400 milliónum, heldur enn at gera tað niður um nakkan á næstu samgongu.

Tað, ið er mest hugstoytt, er nú, at Fólkaflokkurin hevur frítt spæl, tað, ið eftir er av hesum valskeiðnum. Sterkar kreftir eru ótolnar eftir at sleppa framat aftur eitt nú Føroya Banka. Tað hevur longu verið nevnt, at fyrrverandi partaeigarar í Sjóvinnubankanum og Føroya Banka skulu hava fyrimun at keypa partabrøv, og er hettar í tráð við tann fólkaflokspolitikk, ið vit frykta allarmest. Nú tá ið landið hevur bjargað samfelagnum undan skralli, so skulu somu kreftir, ið ábyrgdarleyst framdu rentuspekulatión og annað fáa sínu formøblaðu virðir aftur til ein bíligan penga.

Tørvur er á at vinstravongurin í tinginum ger vart við seg, men trupulleikin er, at Javnaðarflokkurin tykist vera einasti vinstravendi flokkur í Løgtinginum. Gamli samstarvsflokkurin a vinstravonginum í føroyskum politikki við teimum sterku røtrunum í føroysku fakfelagslívi — Erlendur Patursson sáli var formaður í Fiskimannafelagnum — hevur ofrað alt fyri fullveldismálið. Vónandi spyrja nógv seg sjálvan, nú tá samgonguuppskotið fyriliggur, um tað var tað vert.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Daniel Jacob Jensen 80 ár

Í dag fer ein vælkendur tvørámaður um tey áttati.

Tað er Daniel Jacob Jensen, sum síðan hann í 1950 flutti úr Líðini hevur búð nærum øll árini á sjálvum Kirkjuváli í Tvøroyrar hjarta.

Á hesu kirkjugrund fekk eisini fakrørslan sær miðstøð, og kom haðani íblástur til nógv av tí, sum gjørdist vinnulívssøga á Tvøroyri, skapti virksemi og verju av rættindum hjá arbeiðarstættini.

Vit nevna hetta júst tí, at tað er eyðkennandi fyri D. J. Jensen, at hann alt sítt lív hevur kent samhaldsfesti við hesa stætt og sýnt tað í verki

Hansara lívsverk var fyrst og fremst útinnt á havinum fyrst við sluppum og trolarum, men síðan seint í fjørutunum sum útróðrarmaður burturav.

Hann bygdi sær tíðiliga egnan maskinbát og keypti sær seinri dekksfør, fyrst »Hóp« og síðan »Brimnes« og sýndi sanniliga, hvørja drívandi megi hann átti, hóast lagnan hevði lagað tað so, at heilsan mátti sigast at vera sera viðbrekin.

D. J. Jensen var ein teirra, sum fekk smittuna umborð á trolara, og hevur tuberklasjúkan givið honum nógvar drúgvar og svárar sjúkralegur.

Hann bardi seg kortini gjøgnum hesar sjúkralegur og eitt harðbalið og strævið útróðrarmannalív.

Tí ikki løgið, at útróðrarmenn valdu hann í álitisstørv, eitt nú til formans í útróðrarfelagnum og síðan at umboða áhugamál útróðrarmanna í ráfiskanevndini tey gott og væl 10 árini, henda prísásetingarnevnd virkaði

Nýggjur heilivágur seint í fjørutunum og koppingarevni bjargaði Føroyum undan teim lemjandi fylgjum av tuberklasóttini, men D. J. Jensen hevði fingið varandi mein, tí er tað undrunarvert, at júst hann nú fer um tey áttati. Her er talan um seiggi og ein ótrúligan lísvilja, sum vit, ið kenna Dánjal Jacob, gleðast um, tí tær mongu upplivingar, vit hava verið saman um, eru nøkur av teim virðum, sum vit hava fingið í okkara førning.

Fyri smáum 20 árum síðan bygdu Sanna og Dánjal Jacob uppí húsini og fingu eini óvanliga snotulig hús í einum serliga vøkrum umhvørvi við tí lítla, men sera livandi urtagarðinum.

Hetta umhvørvið lýsir júst hegni D. J's, tann røkisskap og grøna áhuga, sum drívir verk hansara. Hygg bert at hinum um alt Føroya kenda rhododendron!

Soleiðis var eisini við »Brimnes«, eitt far, sum mangur hevði á orði sum dømi um gjøgnumført viðlíkahald og ábyrgdarkenslu fyri virðum og tólum.

Í nýggju húsunum merktu vit, sum so ofta sita væl har, at Sanna og Dánjal Jacob kendu seg væl, tí karmarnir vóru so munandi víðkaðir, men tað er so vist, at tað stóra hjartarúmið, sum eisini eyðkendi tey smáu húsini og heimið tá, so ríkiliga skapti karm um eins stóran hugna og hjartaligheit. Hetta kunnu hundraðir av fólkum skriva undir uppá, ikki minst teir mongu skotsku fiskimenn, sum her vunnu vinskap fyri lívið.

Sanna er farin, men vit eru felags um minnini, sum eru ein stórur partur av tí sum nú er.

Støðufesti er ein eginleiki D. J's, sum hevur samband við hansara samhaldsfesti við sína stætt. Tí hevur hann ongantíð dult, at hann er javnaðarmaður burturav.

Altíð til reiðar at stuðla, luttaka á fundum og landsfundum og siga sína meining um førda politikkin so væl, sum hann stungin verður út í kortið.

Vit ynskja tær ein hugnaligan dag og gleða okkum til at hugna okkum saman við tær og tínum, D. J., og ynskja tær hjartaliga tillukku á degnum.

Tríggir vinir

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at kæri pápi okkara

TUMMAS ENOK HANSEN
Vestmanna

andaðist í heiminum 9. mars 82 ára gamal.

Jarðarferðin verður lýst í útvarpinum.

Børnini

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

Marius Absalonsen

doyði og varð jarðaður.
Vit takka grannum, Samkomuni í Bethel, tykkum, sum sendu heilsan og gávu til barnalegurnar í Grønlandi og tykkum øllum, sum fylgdu pápa okkara til gravar. Harrin signi tykkum øll.

Børnini

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæri systursonur okkara

Hans David Jakobsen
Klaksvík

andaðist og fór til gravar. Tøkk til tykkum øll, sum vóru so góð við Hans David, sendu heilsanir og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á foldum.

Vegna tey avvarðandi
Annelena, Julian og Sofus

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Mentan:
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjáplass má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Brúkarabólkur mælir til broytingar

Ein brúkarabólkur fyri svimjihøllina í Klaksvík mælir til broytingar í stóru umvælingarætlanini, sum er gjørd fyri svimjihøllina

UMBYGGING
Eyðun Klakstein

Brúkarabólkur fyri svimjihøllina í Klaksvík mælir millum annað til, at áskoðarapláss verða gjørd í høllini.

Mynd: Eyðun Klakstein

Klaksvík: Í summar verður sett hol á eina umfatandi umbygging av svimjihøllini í Klaksvík.

Átrokandi neyðugt er við umvælingum, skal høllin ikki verða stongd, og nú farið verður undir arbeiðið, er ætlanin at brúka einar 25 milliónir krónur upp á svimjihøllina næstu árini.

Ein ætlan er gjørd fyri umvælingarnar av svimjihøllini, og hesa ætlan hevur ein brúkarabólkur fyri svimjihøllina havt til viðgerðar.

Burtur úr hesi viðgerð er komið eitt tilmæli til Klaksvíkar kommunu um, at nakrar broytingar eiga at gerast í umvælingarætlanini.

Neyðugt við kjaki

Brúkarabólkurin, sum var mannaður við Tinu Purkhús, Dánjal Poulsen og John Færø, fegnast um, at bøtt verður um umstøðurnar í svimjihøllini.

Bólkurin heldur, at hóast tað í fleiri førum er talan um umvælingar, sum hava skund, er hetta so stórt mál, at tað hevur uppiborið eina gjølliga og almenna umrøðu og viðgerð.

Síðani umvælingin kom fram í fjølmiðlunum, hava fólk og stovnar gjørt vart við seg, og hetta heldur brúkarabólkurin er gagnligt fyri ætlanina.

Serlig fyrilit

Brúkarabólkurin hevur gjørt viðmerkingar til strikuuppskotini av umvælingunum, og í fleiri førum mælir bólkurin til, at størri fyrilit verður tikið fyri rørslutarnaðum, so tey eisini kunnu brúka svimjihøllina.

Hetta vísir bólkurin millum annað á, tá talan er um inngongdir og slokir, sum skulu hava góða breidd. Eisini skal nýggja gosbaðið verða í gólvhædd, so rørslutarnað eisini kunnu brúka tað.

Brúkarabólkurin heldur, at áskoðarapláss skulu gerast í svimjihøllini.

– Umframt at tað ikki er pláss er tað har afturat ótíðarhóskandi, at áskoðarar eru í sjálvari høllini, tá svimjikappingar eru. Sjálv høllin skal vera til svimjarar, tíðtakarar og starvsfólk, sigur bólkurin í sínum tilmæli.

Bólkurin mælir eisini til aðrar smærri broytingar við trappum, hyljum og goymslum.

Umrøða onnur uppskot

Umframt viðmerkingarnar til ætlaður umvælingarnar, hevur brúkarabólkurin eisini umrøtt alternativar ætlanir.

Í hesum partinum av tilmælinum nemur bólkurin stutt við, hvussu útbyggingar annars kundu verið gjørdar, men her er talan um meiri víðfevndar ætlanir.

Formaðurin í mentanarnevndini hjá Klaksvíkar býráð, Jórun Høgnesen, sigur, at tilmælið frá brúkarabólkinum og øll onnur uppskot og aðrar viðmerkingar verða gjøgnumarbeidd í nevndini.

Laura loysir av

Laura Joensen tekur við sum leikstjóri í Klaksvík, eftir at hollendski leikstjórin gavst

SJÓNLEIKUR
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Klaksvíkar Sjónleikarfelag heldur fram við venjingunum av leikinum Afturgongur, sum felagið ætlaði at frumsýna í mars mánaði.

Hollendski leikstjórin, sum stjórnaði leikinum, er farin heimaftur til Hollands, tí hon helt ikki, at samstarvið riggaði.

Men maður kemur í mans stað.

Ætlanin er nú, at Laura Joensen tekur yvir leiklutin sum leikstjóri, og venjingarnar, sum vóru komnar væl áleiðis, halda fram.

Eftir upprunaligu ætlanini skuldi leikurin frumsýnast hetta vikuskiftið, men tað verður sjálvandi av ongum. Frumsýningin verður um nakrar vikur.

Afturgongur er ein klassiskur leikur, sum Henrik Ibsen skrivaði seinast í 19. øld.

Einki opið hús

Knapt 100 fólk vitjaðu, tá Tekniski skúli í Klaksvík hevði opið hús næstseinasta vikuskiftið, og skúlin er væl nøgdur við, at so stórur áhugi var fyri degnum.

Vit skrivaðu annars fyrr í vikuni, at opið hús verður nú leygardagin, men hetta tiltak hevur verið og eydnaðist væl.